HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Týsdagin, 5. januar 2016 kl. 16:30

Á fundinum vóru:	Una Matras, Karin Dahl, Bjørghild Djurhuus, Jógvan Arge og Manne Persson
Avboð:	Birgir Kass
Skrivari:	Birgit Arge

Skrá

Nýtt frá leiðslu/skúla:

Á fundinum skulu vit m.a. leggja til rættis fundirnar, sum skulu vera við foreldraumboð, lærarar og fyri øll foreldur.

Fýra danskir læraraskúlanæmingar eru byrjaðir í starvslæru, og tveir aftrat koma seinni í januar.

19. januar 2016 fara øll starvsfólkini á skeið í floksleiðslu. Mentamálaráðið saman við Námi skipa fyri.

Skúlin fær nýtt innbúgv til felagsøkini. Hoyvíkar skúli hevur sent Tórshavnar kommunu tilmæli.

Skúlin hevur meldað seg til matarskipanina hjá PM PLUSS. Skipanin fer at virka frá 18. januar 2016.

9. flokkur í Hoyvíkar skúla fer at taka lut í ungdómstinginum fyrst í februar 2016.

Á komandi fundi við lærararnar fer leiðslan at tosa um telefontrupulleikar, sum tað var spurt um seinast.

Nýggj trivnaðarætlan er í gerð.

Nýtt frá lærarum:

Manne Persson segði frá, at nýtt trygdarumboð er í skúlanum. Tað er Janus Tummas Olsen.

Hoyvíkar skúli má fáa skelti at seta upp, so vit forða bilum í at koyra inn og/ella parkera í garðinum í skúlatíð. Birgit Arge vendir sær til Tórshavnar kommunu hesum viðvíkjandi.

Nýtt frá Tórshavnar kommunu:

Einki nýtt frá Tórshavnar kommunu.

Nýtt frá foreldraumboðunum:

Fundur við foreldraumboðini verður 9. februar 2016, har evnið verður trivnaðarætlanin.

Fundurin við starvsfólkini í Hoyvíkar skúla verður 4. apríl 2016.

Felags foreldrafundurin verður í viku 15. Vit tosaðu um, at evnið kundi vera børn og sosialu miðlarnir. Ynskiligt hevði verið at hoyrt sjónarmið bæði fyri og ímóti.

Fundurin lokin kl. 18:30